# Alberto Korda

## Maðurin handan myndina

### 1928-2001



**Tað vóru kanska tey fægstu, ið løgdu tað til merkis, men fyri sløkum fýra árum síðani andaðist kendi kubanski myndatakarin Alberto Diaz Gutiérrez, vanliga nevndur Alberto Korda. Táið hann fór úr sínum foldarlívi, var hann staddur í París, og var blivin 72 ára gamal. Kubanar jarðaðu hann í Havanna 29. mai 2001. Teimum flestu man hetta navnið vera ókent, men siga vit, at tað var hann, sum tók hina kendu myndina av gitna guerillamanninum Ernesto Che Guevara, ið varð seld í milliónа eintøkum um allan heim, so munna tað vera fleiri ið komast við mannin. Ódeyðiliga myndin hevur eisini gjørt kenda fotografin ódeyðiligan. Eftir eitt slakari tíðarskeið, í áttati og níti-árunum, er gitna plakatin nú aftur at síggja allastaðni. Tú fær valla farið inn í eina klæðnakrambúð í europeiskum metropolum ídag, uttan so, at tú sær eina T-skjúrtu, harið melankolsku eyguni á stóra byltingarmanninum stara út í alheimin. Lakoniskt kanst tú siga, at tað er eitt paradoks, at hesin ungi kommunisturin nú aftur er vorðin heit søluvøra í kapitalistiska heiminum. Og spurningurin er eisini um honum hevði dámt tað? Jaime Sarusky, sum eisini er kubani, hevur skriva hesa greinina til eina bók við myndum hjá Korda. Greinin er leystliga týdd úr enskum.**

**VANGAMYND**

*Týtt hevur Torbjørn Jacobsen*

Hóast tað onkursvegna kann tykjast skaldsøgukent, so er tað ein sannroynd, at fyrsti ferilin av hugi fyri myndatøku, hjá Alberto Korda, var vaktur av einum so natúrligum fyribrigdi sum kærleika. Hann var 16 ella 17 ára gamal tá ið hann gjørdist forliptur í Yolanda, eini gentu úr sama býarpartinum í Havanna harið hann varð borin í heim, 14. september 1928, og harið tey bæði vuksu upp saman.

Í fyrstuni lænti hann myndatólið frá pápanum, eitt Kodak 35, og vanliga var tað Yolanda, ið sat sum modell, tá ið avtakast skuldi. Hon var hansara fyrsti kærleiki og samstundis hansara fyrsta modell, sum myndamaður. Tey ferðaðust víða í hesum heimskenda býi, og hann leiddi hana til øll tey kendu støðini, har ið hann tók myndir, so sum á Malecón-promenaduni, á Bosque og í urtagarðinum kring Nacional gistingarhúsið. Myndirnar av Yolandu gjørdust til endans so nógvar, at tær fyltu uppí eina heila myndabók, ið einans var halgað henni. Hóast hann tá ikki hevði varnast tað, so var tað longu týðuligt hvaðar hugurin, ella yrkisleiðin gekk. Tað var ikki bara sjálv myndatøkan, ið hevði hansara áhuga, men eisini alt tað, sum annars hekk uppi í og við henni. Tað var hetta sum gjørdi hann so kendan seinast í fimtiárunum: Skapanin og aftur skapanin av modellum.

Tað var sjónligt, at tað var meiri enn myndatøkan, sum so, ið roytti í sálina hjá hesum unga manninum Alberto Diaz, seinri kendur um allan heim undir navninum Korda. M.a. ein óbendiligur dráttur at sjálvari myndini. Hetta var sjálvandi eisini orsøkin til hansara vana, ella óvana hevði onkur sagt, at savna og goyma lýsingar úr ymiskum myndabløðum. Eygu hansara vóru drigin ímóti tí, sum hann helt vera vakurt. Og tað var líkamikið um lýsingin var fyri amerikanskar bilar ella franska parfumo, hann klipti alt út og savnaði tað upp í sínar vaksandi myndagoymslur.

Hóast sín unga aldur, var hann ógvuliga hugaður fyri at finna sær eitthvørt fyri hendurnar, og umframt at hann var hugagóður, so komst hetta eisini av tí, at hann onga fíggjarliga hjálp vildu hava frá foreldrunum. Pápin arbeiddi hjá einum jarnbreytafelag og mamman var vanlig húsmóðir. So hissini arbeiddi hann sum sølumaður fyri eina verksmiðju, ið framleiddi sápu, sum roknskaparhjálpari á eini konfektverksmiðju, sum gøtuseljari harið hann seldi bíligar gimsteinar og prýðislutir og sum sølumaður fyri eina medisinska serumroyndarstovu og ditto fyri Remington Rand skrivimaskinur og roknimaskinur annars.

Sjálvt um hetta vóru trongar tíðir, fíggjarliga, so var tað um hetta mundi, at hann keypti sítt fyrsta myndatól, - í eini veðbúð. Dagligani ferðaðist hann íkring við myndatólinum í skjalamappuni, harið tað lá, saman við rakstrarbløðum og serumroyndum, og tá var tað, at hann rættiliga fór undir at taka myndir av øllum tí, sum serliga gjørdi honum mun. Sum hann sjálvur tók til: “Onkursvegna tóktist tað, sum varð eg eggjaður til hetta av sosiala órættvísinum, sum tá var í hesum landinum.”

Soleiðis kom hann at taka myndir av einum lutaseðlaseljara, av eini 4 ella 5 ára gamlari smágentu, ið longsulsfull stóð og hugdi at urum, gimsteinum og øðrum ríkmannalutum í søluglugganum í fremstu gimsteinakrambúðini í Havanna ella av eini mammu, við trimum børnum, ið lá og svav í eini uppgongd, tíðindabløð vóru hennara og teirra rekkjuváðir, ella hin gentan við teimum stóru vøkru eygunum, ið sat og ruraði einum viðabuli ístaðin fyri eini dukku, sum hon ongantíð fekk fíggjarligar møguleikar at hjúkla fyri. Seinri spurdi hann mangan seg sjálvan, hví og til hvørs endamál, hann mundi taka hesar myndirnar. Hann var jú ikki tíðindamaður, og ongin ynskti at keypa tær heldur. Svarið var bara, at hann ynskti júst hesar myndirnar, og tí vórðu tær tiknar.

Nógvir ymiskir faktorar høvdu tað við sær, at myndatøka ikki bara gjørdist hansara arbeiði, men eisini hansara lagna, - onkursvegna. Hann varð kringsettur av fotografering. Um hetta mótið hitti hann Mario Naranjo, ið var best kendi barnafotografurin í Havanna um hetta mundið. Tað var Naranjo, sum varnaðist góðu evnini hjá Korda, og hann beyð honum at arbeiða í atelieri sínum, eitt tað fyrsta av sínum slagi í Kuba har ið teir m.a. gjørdu myndafresko´ir. Har hitti hann eisini hin kenda Newton Estapa. Og tað var ímeðan hann eygleiddi hendan seinra, at hann veruliga lærdi at brúka eitt myndatól, soleiðis sum ein yrkisfotografur eigur at gera tað.

Tað hendi tíðum, at Luis Pierce Vier vitjaði í atelierinum. Teir gjørdust vinmenn og seinri partnarar í einum atelieri, sum teir skipaðu saman í fimtiárunum. Hvørki hetta navnið ella Alberto Diaz verður brúkt um teir longur, av tí at teir fóru undir at nýta hjánavnið Korda, eftir ungarska filmsleikstjóranum í Zoltan og Alexander.

Alberto varð síðani bara kendur sum Korda (sum eisini líkist orðinum Kodak, og soleiðis varð hann á ein hátt bundin at myndaalheiminum) ímeðan Luis, sum við sínum eyðkenda hvíta skeggi, mest álíkur Hemmingway, var kendur sum gamli Korda.

Tað gekk ikki long tíð, minni enn tvey ár, so var hetta nýggja atelierið gitið fyri at húsa teimum vakrastu gentunum í Havanna. Tær sótu ella stóðu, sum modellir hjá Alberto. Ein av teimum æt Norka. Hon hevði eina øgiliga atdráttarmegi og bar seg sjálva við slíkari elegansu, at tað endaði við, at hon og myndatakarin gingu saman í hjúnalag.

Korda nýtti nakrar av myndunum sum satsupprit til lýsingaragentarnar, ið sjálvandi ynsktu at keypa tær. Hann var hin fyrsti persónurin, ið tók myndir av kubanskum móta, borin av kubanskum modellum. Eyðkennið hansara varð, at hann altíð nýtti tað natúrliga ljósið. Myndirnar vórðu brúktar í vikubløðum, og hetta gjørdi, at teir fingu fíggjarligan vind í seglini. Teirra nøvn vórðu viðurkend, menninir somuleiðis, teir høvdu longu kjølfest seg, sum teir alrabestu mótafotografarnir á oynni.

Eins og flestu kubanar annars, gjørdist Korda ein partur av sigursrúsinum, tá ið kollveltingin sigraði á hermegini hjá einaræðisharranum Fuelgencio Batista, hin 01. Januar 1959. Gøturnar gjørdust bæði miðdeplar og keldur í søguni, eisini í frásøguni, sum so ógvusliga og radikalt broytti lívið og dagligdagin hjá øllum kubanum. Ímillum myndamenninar, sum fyri ævina skjalfestu hesa sermerktu hending, var Korda, ið lat sínar myndir til ymsi tíðarrit, kanska serliga til blaðið Revolución, har ið eg tá var blaðstjóri. Onkrar av hansara mest týðandi myndum og royndum vórðu endurframleiddar í djúpprents-prosessini hjá blaðnum. Og tað var her at Korda og eg hittust aftur, eftir at vit ikki høvdu hitst í eini 20 ár, tað mundi ikki vera síðani 1942, minnist meg rætt, tá ið vit báðir gingu í einum protestantiskum fólkaskúla í Havanna.

Heilt frá byrjanini var Korda maðurin, sum tók myndirnar, tá ið Fidel Castro ferðaðist kring um á oynni, og eisini tá ið hann hitti týðandi personasjur sum Ernest Hemmingway og Jean Paul Sartre m.a. og harumframt tá ið hann vitjaði uttanlands í Venezuela, U.S.A, Sovjetsamveldinum og í øðrum londum.

Tá ið hann avmyndaði kollveltingina og Fidel, Che og aðrar oddamenn, ið vóru ungir og dragandi um hesa tíðina, brúkti hann somu hugsjón og somu tøkni, sum tá ið hann avtók mótamyndirnar av kvinnunum í Havanna. Serliga eyðkenni var hetta natúrliga ljósið, ið gjørdist fundamentala sermerkið í karrieru hansara, heilt til endans.

Korda játtaði, at eitt stríð fór fram innaní honum, ímillum hesar báðar áhugarnar, myndatøku av sosialum fyribrigdum og fotografering av mótafyribrigdum, og hann legði dent á, at markið harímillum var egghvast. Hansara hetja, í yrkinum, um hetta mundið, var Raúl Corrales. Hann virdi Corrales somikið, at hann í longri tíð granskaði myndir hansara. Og tað var einki hann heldur vildi, enn at nýtt somu tøkni og sama stíl sum hann, men tíðin og arbeiðið loyvdu hesum ongantíð. Teir báðir hittust tó í januar mánaða 1959 og gjørdust eftir tað professionellir samstarvsmenn og vinmenn.

Kubanska kollveltingin varð